FØROYA NÁTTÚRUGRIPASAVN / SØVN LANDSINS

# Lundi

## *Fratercula arctica grabae*

## Teljing í Mykinesi í 2014

Leivur Janus Hansen, Christina Joensen, Sunniva S. Sigurdardóttir
og Jóhannis Danielsen

**27-05-2015**



Í Juli og August vórðu lundaholur í Mykinesi kannaðar. Endamálið var at meta um hvussu nógvir ungar kundu koma undan í 2014. Í 2011, 2012 og 2013 var eingin livandi pisa at síggja í nakrari kannaðari holu, men í 2014 sóust livandi pisur í 2,6% av holunum.

## Endamál
Endamálið við teljingini er, at gera eina álítandi meting av talinum av búfuglum í lundastovninum í Mykinesi. Somuleiðis skal ein álítandi meting gerast um gongdina hjá hesum lundastovninum.

## Arbeiðsháttur
Mannagongdin, ið nýtt varð, er útgreinað í Lundi *Fratercula arctica grabae*: Fyribils mannagongd fyri teljing (Hansen, Simonsen, Olsen, & Hammer, 2013).

Holur vórðu kannaðar fyri at telja, hvussu nógvar pisur kundu væntast floygdar.

## Virksemi

Henda teljing verður fíggja í felag við drunnhvítateljingina í Nólsoy og tær verða samskipaðar. Í 2014 varð avgjørt einans at kanna holur og ikki telja nýggj øki í Mykinesi.



**MYND 1. Í HVØRJUM PUNTI VÓRÐU 30 M² KANNAÐIR Í 2011 OG 2012.**



**Mynd 2. Í hvørjum punti vórðu 10 m² kannaðir í 2013.**



**Mynd 3. Í hvørjum punti vórðu 10 m² kannaðir í 2014.**

Í Juli og August 2014, varð kannað í hvønn mun holur høvdu verið nýttar (Talva 1). Tá verður hugt eftir, um mold liggur útfyri holuna, um grasið er traðkað, um skvettur sæst og so framvegis. Um ein hola sær út til at hava verið nýtt, so verður endoskopið nýtt til at vita, um pisa er í.

Í 2011 og 2012 vórðu heilt fá økir verið kannaði; fýra í 2011 og fimm í 2012. Tá varð kannaða flatan lutfallsliga stór, 30 $m^2$. Í 2013 og 2014 varð flatan í kannaðu økjunum minni, 10 $m^2$ og talið av teimum var hægri. 27 í 2013 og 46 í 2014. Í onkrum teirra var als eingin hola.

Í 2011 vórðu lundaholur taldar í Lamba og Dalinum, men ikki allar. Í 2012 vóru lundaholur taldar í Hólmi, Lamba og Dalinum. Í 2011 til 2014 varð meting gjørd av, hvussu nógvar pisur komu undan.



**MYND 4. SILDBERI.**

## Úrslit

**Talva 1. Í 2011, 2012, 2013 og 2014 vórðu holur kannaðar. Tær vórðu skrásettar sum óbrúktar, brúktar og brúktar við livandi pisu.**

| | Lamba | | | Dalurin | | | Hólmur | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Óbr. | Brúkt. | Pisa | Óbr. | Brúkt. | Pisa | Óbr. | Brúkt. | Pisa |
| **2011** | 93 | 56 | 0 | 97 | 44 | 0 | | | |
| **2012** | 43 | 99 | 0 | 42 | 74 | 0 | 14 | 18 | 0 |
| **2013** | 41 | 91 | 0 | 47 | 82 | 0 | | | |
| **2014** | 60 | 105 | 4 | 40 | 108 | 4 | | | |

Í 39 puntum vóru 313 holur. Av hesum bóru 213 tekin um brúk og vórðu tískil kannaðar við endoskopi. Í hesum 213 holum sóust 8 livandi pisur og 5 deyðar.

8 livandi pisur í 313 holum er 2,6%. Tískil kann sigast, at í hesum økinum høvdu 2,6% av holunum livandi pisu.

Tað eru um 60.000 holur vestanfyri bygdina (Hansen, Simonsen, & Danielsen, 2013). Um 2,6% av teimum høvdu livandi pisu, so var talið um 1500 livandi pisur í 2014.

8 pisur er eitt lágt tal, at gera nakra greiða meting út frá og tískil hevur einki verið gjørt við, at rokna uppá neyvleikan av tølunum.




**Mynd 5. Holur, ið vórðu brúktar, vórðu kannaðar við endoskopi.**

## Niðurstøður
Hvørki í 2011, 2012 ella 2013 vórðu livandi pisur sæddar í holum, sum vórðu kannaðar. Tað merkir, at hóast onkur pisa varð floygd í økinum, so hevur talið í mesta lagið verið nakrar hundrað.

Í 2014 vóru 8 livandi pisur sæddar í holum, sum vórðu kannaðar. Tað merkir, at í økinum vestanfyri bygdina kann talið hava ligið um 1500 livandi pisur.

Hvussu nógvar av hesum komu á veingirnar er ógreitt.

## Tøkk
Jarðeigarar og fólk annars í Mykinesi skulu hava tøkk fyri hjálp og vælvild.

## Keldur

Hansen, L. J., Simonsen, W., & Danielsen, J. (2013). *Lundi Fratercula arctica grabae: Teljing í Mykinesi í 2012*. Tórshavn.

Hansen, L. J., Simonsen, W., Olsen, B., & Hammer, S. (2013). *Lundi Fratercula arctica grabae: Fyribils mannagongd fyri teljing*. Tórshavn.